# ítróttur

Nr. 33 • mikudagur • 15. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# Ungir telvarar til Finlands

**Komandi vikuskifti luttaka 10 unglingar úr Føroyum í Norðurlandameistaraheitinum (NM) í talvi fyri ung, sum hesuferð er í Esbo í Finlandi. Kappingin er á hvørjum árið um miðjan februar, sum norðurlondini skiftast um at fyriskipa**

TALV



*Hjalti Toftum Jógvansson úr Havn og Rógvi Egilstoft Nielsen úr Sandavági eru tveir av ungu telvarunum, sum verða við í NM*

Kappingin er skipað í aldursbólkum og Norðurlondini eru umboðað við tveimum telvarum hvør í hvørjum aldursbólki.

Í Føroyum vóru úttøkukappingar, sum samstundis vóru FM-kappingar, í november mánað 2005. Føroyameistarin og nr. 2 í aldursbólkunum umboða Føroyar í Finlandi.

Seinnu árini hevur Talvsamband Føroya úttikið 10 telvarar at umboða Føroyar - t.v.s. sama luttakaratal sum hini Norðurlondini lata seg umboða við. Hetta er liður í miðvísari ungdómsmenning, sum tryggjar, at telvararnir longu á ungum árum fáa altjóða royndir.

Tveir av okkara sterkastu telvarum - Martin Poulsen og IM John Rødgaard - hava staðið fyri venjingum undan NM. Somuleiðis hevur venjingarlega verið vesturi í Vágunum.

Søguliga sæð, hevur hepnast fleiri føroyskum telvarum at vinna bronsuheiðursmerki í NM, og stundum hevur resta sera lítið í enn betri plaseringum. Vánirnar til komandi NM eru góðar, nú telvararnir alsamt hava størri royndir í hesum høpinum, hóast ásannast má, at mótstøðan er sera hørð frá størru grannatjóðunum.

### Telvarar 10 ár og yngri

Í yngsta bólkinum luttaka Høgni Egilstoft Nielsen úr Sandavági og Johan Hentze av Norðskála. Hóast bert 8 ára gamal, hevur Høgni royndir frá NM í Noregi í 2005 - og er Føroyameistari í aldursbólkinum annað árið á rað. Johan Hentze hevur ikki roynt seg í hesum høpinum áður og spennandi verður, hvussu støðuga framgongdin í seinastuni fer at hilnast í kappingini. Tvey ógvuliga spennandi umboð í yngsta bólkinum.

### Telvarar 11 - 12 ár

Føroyameistarin, Heiðrikkur Tindskarð Jacobsen úr Tórshavn og Jóhann Vørmadal úr Vestmanna, umboðað Føroyar í hesum bólkinum. Jóhann hevur roynt seg áður til NM, meðan Heiðrikkur í fleiri umførum júst er vorðin ov stuttur - men hesuferð bragdaði. Bólkurin er ofta opin, men mótstøðan er munandi harðari, í mun til yngsta bólkin. Hóast styrkismettir niðarlaga í feltinum er rímiligar vánir fyri einum heiðurligum úrsliti.

### Telvarar 13 - 14 ár

Aftur hesuferð verða Føroyar umboðaðar av tvífalda føroyameistarnum Hjalta Toftum Jógvansson úr Tórshavn og Rógva Egilstoft Nielsen úr Sandavági. Hesir báðir luttaka á 4 sinni uppí slag í NM høpi. Rógvi vann bronsu, tá NM varð hildið í Føroyum fyri 4 árum síðani. Og brúk verður fyri royndunum teir higartil hava ognað sær, tí móttstøðan verður rættiliga hørð - men raka teir “dagin”, kann tað eisini í hesum bólkinum gerast spennandi.

### Telvarar 15 - 16 ár

Tær heilt stóru vánirnar eru í hesum bólkinum, sum verður umboðaður av helst stórsta stjørnuskotinum í føroyskari telving seinnu árini Helga Dam Ziska úr Tórshavn og unglingaføroyameistaranum Rógva Dragaberg úr Klaksvík. Helgi liggur styrkismettur sum nr. 2 í kappingini, meðan Rógvi er styrkismettur nakað niðari. Báðir eru ímillum okkara royndastu unglingatelvarar bæði her heima og uttanlands.

### Telvarar 17 - 20 ár

Útlitini í hesum bólkinum eru eisini rættiliga góðar. Olaf Berg, sum gjøgnum árini, nærum uttan undantak hevur luttikið í NM - heilt frá yngsta bólkinum - og vunnið fleiri bronsuheiðursmerki á vegnum, seinast í Karlstad í 2004, fer óivað at leggja nógv fyri, nú hetta er seinasti møguleikin at luttaka í NM-høpi fyri ung. Men spenningurin er eisini stórur, um Sjúrður Torsteinsson av Tvøroyri, sum s‡nist at vera rættiliga væl fyri, aftur í ár fer at gera um seg - seinasta NM var um reppið, at Sjúrður fekk eina plasering.

Sí annars meira á www.faroechess.com, har til ber at fylgja telvingini í døgunum 17. - 19. februar.



*Bjartur Lamhauge vann kappingina hjá monnum*

## Bjartur sló til

**Bjartur Lamhauge vann kappingina í tungvekt, tá ið innandurakapping í rógving var í Havn farna vikuskiftið**

RÓGVING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sterkasti føroyski rógvarin í løtuni, Jón Rosenblad úr Lamba, var ikki við í kappingini, sum Havnar Róðrarfelag skipaði fyri um vikuskiftið, og tað gjørdi kappingina í tungvekt hjá monnum meira spennandi, enn hon annars hevði verið.

Og hesaferð var tað Bjartur Lamhauge úr Havnar Róðrarfelag, sum var frammanfyri allar hinar rógvararnar og vann kappingina. Í hølunum á honum komu Martin R. Dahl og Magnus Madsen, báðir úr Argja Róðrarfelag.

Hjá kvinnunum var tað Kartin Olsen úr Knørri, sum vann kappingina.

Kappast var í nógvum ymiskum bólkum, og úrslitini síggjast á heimasíðuni hjá Havnar Róðrarfelag, www.drekin.fo

# Ukraina hevur sett seg upp á tvørs

**Ukraina vil ikki góðtaka dystarskránna, sum hini londini í okkara EM-bólki eru blivin samd um. Ukraina heldur, at Frakland hevur ov stóran fyrimun av skránni. Avleiðingin kann verða, at UEFA dregur lut um, hvussu dystirnir skulu spælast**

FÓTBÓLTUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ukraina vil ikki spæla við meir. Eftir at Føroyar og hini londini í okkara bólki til EM-undankappingina í fótbólti vóru blivin samd um, hvussu dystirnir í bólkinum skuldu spælast, hevur Ukraina lagt fót fyri avtaluna.

UEFA krevur, at øll londini skulu semjast um dystarskránna, áðrenn hon er endaliga, men tað vil Ukraina ikki gera.

– Vit kunnu ikki góðtaka skránna, sum varð løgd í Paris. Vit halda, at Frakland fær ov stóran fyrimun, tí teir spæla á heimavølli seinastu fýra dystirnar, skrivar ukrainska fótbóltssambandið í einum brævi til hini londini í bólkinum.

Harafturat heldur Ukraina, at tað er ein vansi fyri teir, at teir skulu spæla á heimavølli fyrst ímóti bæði Fraklandi, Italia og Skotlandi.

Tí mælir Ukraina til, at dystirnir ímillum teir og Frakland verða b‡ttir um, og at dystirnir millum Ukraina og Litava eisini verða b‡ttir um.

### Kann enda við lutakasti

Í løtuni halda samráðingarnar millum tey sjey londini fram. Føroyar og hini fimm londini hava verið samd um eina dystarskrá, men nú verður arbeitt við onkrum smávegis broytingum, so at Ukraina eisini kann góðtaka skránna.

Tað er tó ikki líkt til, at Litava og Frakland vilja ganga krøvunum frá Ukraina á møti, men møguliga kann onkur onnur smávegis broyting bøta um støðuna.

Eitt uppskot er, at dystirnir ímillum Føroyar og Frakland verða býttir um, so at Frakland ístaðin kemur til Føroya móti endanum av kappingini. Hetta hevur so við sær, at Føroyar ikki fáa nakran veruligan pengadyst í ár, tí bæði heimadystirnir ímóti Italia og Fraklandi liggja næsta ár.

Tað er ikki vist, at hendan broytingin kann loysa knútin, men partarnir halda fram við at tosa saman, og skuldi tað ikki borið til at funnið eina semju, fer UEFA at draga dystarskránna tann 2. mars. Tað vilja øll londini helst sleppa undan, tí tá hava tey onga ávirkan á dystarskránna longur.